## Meiri toskur í Eystrasalti

Fiskimenn í Eystrasalti kunnu fegnast um, at teir sleppa at fiska meiri tosk næsta ár enn í ár. ICES hevur boðað frá, at toskastovnurin í Eystrasalti er so mikið væl fyri, at tað er ráðiligt at økja toskakvotuna 8,6 prosent í vestara parti av Eystrasalti og heili 15 prosent í tí eystara partinum. ICES hevur harafturímóti ikki tann besta boðskapin um sildina í Eystrasalti, men mælir til at skarva 28 prosent av verandi kvotu. Tað sama sigur ICES um brislingakvotuna. Fiskimálaráðharrarnir í ES-londunum fara seinni í ár at taka støðu til kvoturnar í Eystrasalti næsta ár, og ætlandi fellur avgerðin síðst í oktober, sigur DR.

## Ryanair hevur hall

Írska lágprísflogfelagið Ryanair hevur ilt við at halda flognum í hesum krepputíðum. Roknskapurin seinasta roknskaparár endaði tann 31. mars, vísir, at Ryanair hevði 169 milliónir evrur í halli seinasta roknskaparár. Tað má sigast at vera ein stór broyting samanborið við roknskaparárið undan, tí tá hevði Ryanair 390 milliónir evrur í avlopi. Um tað vánaliga úrslitið í fjør sigur Ryanair, at tað komst serliga av dýrum brennievni og trupulleikum hjá flogfelagnum Air Lingus, sum Ryanair eigur í. Ryanair flutti 15 prosent fleiri ferðafólk seinasta roknskaparár, og inntøkurnar øktust 8,5 prosent.



# Bjarti skjýtur ábyrgdina eftir russum

**Bjarti Mohr vil als ikki vita av, at tað er hann, ið skal hava ábyrgdina av at trolarin Casablanka liggur sum hann liggur. – Føroyska felagið hevur bert leigað skipið út. Russar hava tveitt hesa uppgávu yvir á okkum uttan at gjalda eina krónu, sigur Bjarti Mohr**



*Síðan juli 2007 hevur Casablanka, ella Hallarklettur, sum hann eitur í Skipalistanum, ligið í arrest í Noregi, eitt nú við hesa keiina. Skipið lekur, og norskir myndugleikar vilja sleppa av við tað skjótast. Tí hava teir loyst skipið úr arrestini við at taka veðhald í tí fyri bótini. Bjarti Mohr, ið eigur skipið, skjýtur hinvegin alla ábyrgdina fyri at skipið liggur sum tað liggur, yvir á russiska felagið, ið leigaði skipið. Tað felagið er farið á húsagang*

*mynd: Staale Wattø, Sunnmørsposten*

CASABLANKA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroyskt átti trolarin Casablanka hevur í skjótt tvey ár ligið við bryggju í Noregi. Bót á 300.000 norskar krónur fyri ólógligan fiskiskap var orsøkin til, at trolarin varð lagdur í arrest í Ålesund. Men bótin varð ongantíð goldin, og trolarin við manning varð liggjandi.

Nú hava norskir lokalmyndugleikar fingið nokk av trolaranum, ið hevur ligið og gnagað gummi í síðan juli 2007, uttan at hava goldið havnargjald. Teir vilja sleppa av við hesa flótandi umhvørvisbumbuna, sum umhvørvisráðgevin í Ålesund Kommunu, Gunnar Godø, kallar trolaran. So gjarna vilja teir sleppa av við Casablanka, at teir hótta við at ognartaka og selja trolaran á tvingilssølu, ger eigarin ikki vart við seg sum skjótast.

### Leigðu bara skipið út

Tað er Bjarti Mohr, ið umvegis Sp/f 01.03.2007, betri kent sum Selberg, er eigari av trolaranum Casablanka. Men hann vil als ikki vita av nakrari ábyrgd fyri at trolarin liggur fyri vág og vind í Noregi. Sambært honum hevur Casablanka verið í charter hjá einum russiskum felag í meira enn tvey ár.

- Føroyska felagið, sum eigur Casablanka, hevur bara leigað sjálvt skipið út, og tað eru russar, sum hava skyldu til at halda skipið og at halda avtalurnar við manning, havnamyndugleikar og so framvegis. Vit hava als einki við hatta at gera, sigur Bjarti Mohr.

### Ætlaðu nokk ongantíð at fiska

Tað var á vári í 2007 at felagið Selberg leigaði skipið út til eitt russiskt felag í Murmansk. Hvussu tað felagið eitur, minnist Bjarti Mohr ikki heilt, okkurt við Northern Research, sum tó er farið á húsagang nú.

Tað mundi verða stokkut gleði hjá russiska felagnum at leiga Casablanka. Í maj mánaði 2007 lá trolarin, sambært heimasíðuni hjá Jóanis Nielsen, við bryggju í Miðvági, og væntar havnarmeistarin, Ventzel Nattestad, at skipið verður liggjandi í út við tveir mánaðir.

Tveir mánaðir eftir, í juli 2007, verður trolarin tikin fyri ólógligan fiskiskap í norskum sjógvi, og lagdur í arrest í Ålesund Kommunu.

Men sambært Bjarta Mohr var ætlanin nokk ikki at skipið skuldi til fiskiskap.

- Teir høvdu eina kvotu, sum teir ikki fingu brúkt, tí teir einki skip høvdu. Tí leigaðu teir Casablanka. Men ætlanin var nokk ongantíð at fiska nakað serligt. Tað var onkur teknisk manøvra, sum teir skuldu gera, fyri at kunna brúka kvotuna, greiðir Bjarti Mohr frá.

### Russar hildu ikki skyldurnar

Bjarti Mohr greiðir eisini frá, at russiska felagið ikki hevur hildið sínar skyldur móti felagnum hjá Casablanka, og at teir tí hava sagt avtaluna upp við russiska felagið.

*Nær varð henda avtalan uppsøgd?*

- Tað minnist eg ikki heilt, men tað var einaferð í desember, sigur Bjarti Mohr.

*Tú sigur, at russarnir ikki høvdu hildið sínar skyldur móti felagnum hjá Casablanka?*

- Nei, teir hava ikki so mikið sum goldið eina krónu, staðfestir Bjarti Mohr.

Hvussu eitt skip kann verða útleigað í næstan tvey ár, uttan at felagið fær eina krónu afturfyri at leiga skipið út, kann tykjast ógvuliga løgið. Men sambært Bjarta Mohr hava russar tó ikki einki givið afturfyri leiguna.

- Teir hava gjørt bátin í stand, tað skulu teir eiga. Og eg havi roknað tað uppí sum leigu, staðfestir Bjarti Mohr.

Fyri hálvum ári síðani var vælvildin hjá Bjarta Mohr tó uppi, og segði hann leigusáttmálan við russiska felagið upp.

### Ábyrgdin aftur á føroyskum hondum

Leigusáttmálin við russiska felagið í Murmansk, sum leigaði Casablanka, er altso sagdur upp í desember mánaði, við hálvt ára uppsagnartíð.

Sostatt er ábyrgdin av Casablanka, ið enn liggur við bryggju í Noregi, aftur á føroyskum hondum. Og Bjarti Mohr væntar eisini at málið verður loyst skjótt.

- Tað er eingin ivi um, at russar hava tveitt hesa uppgávu yvir á føroyska felagið, uttan at gjalda eina krónu. Men vit arbeiða við at fáa málið loyst so skjótt til ber, sigur Bjarti Mohr.

Eftir ætlan fara teir yvir til Noreg eftir bátinum skjótt, og ætlanin er so at selja bátin.

Men hvussu verður við útreiðslunum, ið norsku myndugleikarnir hava havt av Casablanka, er ikki til at vita, tí Bjarti Mohr ætlar so einki at gjalda.

- Tað eru russar, ið eiga hasa bótina. Eg fari so ikki at betala hana, staðfestir Bjarti Mohr.

Hetta kann tó gerast ein torfør uppgáva at loysa. Norska løgreglan loysti nevniliga skipið úr arrestini fyri kortum, eftir at teir høvdu fingið trygd fyri kravinum við at taka veðhald í skipinum.